# ítróttur

Nr. 167 • fríggjadagur • 31. august 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Heðin kann fáa møguleikan



**At Øssur er leikbannaður, letur upp fyri nýggjum møguleikum hjá Allani Simonsen ímóti Luksemborg**

LANDSDYSTUR

*Jóannes Hansen*

Fyrrapartin í gjár hevði landsliðið fyrstu venjingina. Teir eru á Svangaskarði, har HM undankappingardysturin ímóti Luksemborg er á skránni leygardagin klokkan 17.

Líkindini vóru góð, og lagið var gott á spælarunum og teimum, sum hava við teir at gera.

– Eftir dystin leygardagin fáa spælararnir frí, og so hittast vit aftur í Havnini sunnukvøldið, sigur Allan Simonsen. Mikudagin klokkan 17.30 verður dysturin ímóti Russlandi á Tórsvølli.

Spælararnir tóktust allir vera væl fyri, og teir hava nógv og gott fólk kring seg. Umframt Allan Simonsen og Jógvan Martin Olsen, sum taka sær av ítróttarliga partinum, eru tveir fysioterapeutar – Álvur Hansen og Klæmint Isaksen – og ein lækni – Jens Pauli Marstein. Tann, sum tekur sær av klæðunum, er Birgir Hansen. Hann hevur verið við á onkrari landsliðsferð uttanlands, men hetta er fyrsta ferðin, at hann er við á heimavølli.

## Øðrvísi uppgáva

Stóri spurningurin, tá landsdystur er á skránni, er hvørjir teir fyrstu ellivu vera á vøllinum. Hesa ferð er greitt, at tað verður neyðugt at gera onkra broyting, tí Øssur Hansen er leikbannaður. Tað vil við øðrum orðum siga, at ein nýggjur maður skal setast á síðuplássið í vinstru.

Allan Simonsen vil ikki gera øðrvísi viðmerkingar um tað, enn tær, sum hann plagar at koma við, tá hann tosar rundanum. Men hann ásannar, at talan verður um øðrvísi uppgávu enn hana, sum var á skránni, tá landsliðið fyri fjúrtan døgum síðani var í Jugoslavia:

– Ta ferðina vóru vit undir stórum trýsti, men okkara menn vóru fantastiska væl skipaðir, og teir stóðu seg framúr væl í verjupartinum, sigur venjarin.

Allan Simonsen vil kortini ikki siga, at tað er púra upplagt, at liðið fer at síggja akkurát soleiðis út, sum tað gjørdi í Beograd.

– Fyri tað fyrsta skulu vit hava ein nýggjan mann inn fyri Øssur, sum er leikbannaður. Í Jugoslavia høvdu vit fýra spælarar í miðverjuni. Óli Johannesen var aftastur, og frammanfyri hann vóru Hans Fróði Hansen, Jens Kristian Hansen og Johan Byrial Hansen. Ta ferðina vistu vit, at miðverjan fór at koma undir eitt øgiligt trýst. Hesa ferð er mótstøðan av einum heilt øðrum slagi. Vit fara ikki at koma undir sama trýstið, og so er spurningurin, um vit skulu flyta eitt sindur um upp á fólkið. Tað er eisini treytað av, um mótstøðuliðið fer at spæla við einum ella tveimum spælarum frammi, sigur Allan Simonsen.

Ætlar tú at spæla væl meiri framrættað, enn tú plagar at gera ímóti stóru tjóðunum?

– Spuringurin er, um vit skulu undirhalda og kanska gloppa eitt sindur longri afturi á vøllinum, ella um vit skulu vera varnir og so í síðsta enda fáa hinar at mistaka seg, so vit kunnu sekta teir. Tað sigur seg sjálvt, at tað er øðrvísi at spæla á heimavølli ímóti Luksemborg, enn tað er at spæla ímóti Jugoslavia á útivølli, men tað er alneyðugt um ikki at gera mistøk, sum kunnu kosta dýrt.

## Heðin ella Súni

At Øssur Hansen ikki er við í morgin ber fleiri møguleikar við sær. Sammett við dystin í Jugoslavia er ein møguleiki, at Jens Kristian Hansen verður fluttur úr miðverjuni og út í síðuna. Tað plássið hevur hann fleiri ferðir røkt á landsliðnum og í B36. Hetta er ein lítil broyting, og tað hevði líkst Allani Simonsen væl at gingið inn fyri henni.

Ein annar og meiri víðgongdur møguleiki er, at Allan Simonsen velur at geva Súna Olsen ella Heðini á Lakjuni møguleikan í vinstru síðu. Súni Olsen er meiri bóltspælari enn Heðin, meðan B36 maðurin – eftir føroyskum viðurskiftum í hvussu so er – er sera skjótur. Súni Olsen var í GÍ fleiri ferðir á hesum plássinum, men tað er helst skilabetri at brúka hann longri inni á vøllinum.

Nú er langt síðani Heðin á Lakjuni fyrstu ferð varð úttikin til landsliðið. Hann hevur ongantíð rættuliga fingið møguleikan at royna seg. Bæði í fjør og í ár hevur hann verið uttanfyri átjan manna liðið, men tá landsliðið fór til Jugoslavia fekk hann boð, eftir at fleiri høvdu givið avboð.

Í altjóða dystum gagnar skjótleikin hjá Heðini ikki so nógv, sum hann ger í heimligu kappingini. Men tá Luksemborg er mótstøðuliðið, er einki at ivast í, at Heðin hevur betri møguleikar, enn hann hevur í so mongum øðrum landsdystum. Tí hevði tað verið ein spennandi roynd, um venjarin hesa ferð hevði givið Heðini, sum higartil er skrásettur fyri fýra landsdystir, møguleikan frá fyrsta bríksli.

*Fráveran hjá Øssi Hansen letur upp fyri nýggjum møguleikum, og ein teirra er, at Heðin á Lakjuni, sum í ár hevur verið flúgvandi fyri B36, kann fáa møguleikin frá fyrsta bríksli*

## Fýra møttu ikki upp

Stóra ráðstevnan í hesum døgum er orsøkin til, at fleiri av útisetunum ikki fingu pláss í flogfarinum úr Danmark

Tá landsliðið fyrrapartin í gjár savnaðist á Svangaskarði, vóru bara fimtan spælarar til staðar. Talan var um fýra útisetar, sum komu til Føroya fyrrapartin í gjár. Tað varð roknað við, at teir fóru at vera við, tá landsliðið skuldi venja í gjárkvøldið.

Julian Johnsson, Johan B. Hansen, Óli Johannesen og Øssur Hansen vóru ikki á Svangaskarði fyrrapartin í gjár. Øssur skuldi ikki koma til Føroya fyrrenn í dag. Hann er leikbannaður ímóti Luksemborg, men hann verður við í fyrireikingunum kortini. Øssur verður aftur á liðnum mikudagin, tá Russland verður mótstøðuliðið.

– Vit hava havt trupulleikar at fáa pláss í flogførunum. Tað er stóra ráðstevnan, sum í hesum døgum er í Føroyum, sum er orsøkin til hetta. Vit bíløgdu pláss í so góðari tíð, sum vit plaga at gera, men ráðstevnu luttakararnir hava verið í uppaftur betri tíð, ásannar Ísak Mikladal, aðalskrivari í Fótbóltssambandinum.

Jákup Mikkelsen, Súni Olsen og Allan Simonsen komu fyrr í vikuni úr útlandinum. Onkur av útisetunum í Danmark var í lufthavnini í fyrradagin, men noyddist at fara til hús aftur, tí flogfarið var fullsett. Men seinnapartin í gjár var landsliðshópurin fullmannaður.

***jh***

# hygg & hoyr

Frá fríggjadegi 31. august til hósdagin 6. september

## Deyðans Kjaftur 4




*Ellen Brody er júst komin fyri seg, eftir at maður hennara er deyður, tá tann svangi, blóð-tysti hávurin vísir seg aftur.*

*Sonur Ellen, sum eitur Sean, hevur fingið arbeiðið hjá pápanum og er úti á havinum at hyggja seg um. Knappliga hendir okkurt undir honum. Báturin koppar og Sean er horvin. Tann hvíti hávurin hevur aftur gjørt um seg.*

## Før Robinson Expiditionen 2001




*Henda sendingin hevur samrøður við allar luttakararnar, og tær eru upptiknar í Danmark, áðrenn Robinson varð sett í gongd.*

*Harafturat eru samrøður við við fleiri av persónar, sum eru knýtt at framleiðsluni av sendingunum.*

## License to kill




## Time of your life




## Philadelphia




## TV Razzia

